


Myndir: Álvur Haraldsen

# Levera, tá vit skulu

Hilmar Jan Hansen

Hóast hann er 30 ára gamal og javnan hevur trupulleikar í rygginum at dragast við, so megnaði Rúni Weihe enn eina ferð at vísa sítt virði, tá mest var brúk fyri tí. Og tí kundi hann í gjár standa saman við liðfeløgunum í ÍF og fegnast um føroyameistaraheitið.

– Hetta var hart, og tað má tað eisini vera, tá tvey tey bestu liðini spæla upp til sítt besta. Dysturin leygardagin sat øgiliga tungt í beinunum í morgun og at byrja við í dystinum í dag, men so blivu vit heitir og komu í gongd, segði Rúni eftir seinnu finaluna á Eiði í gjár.

– Eg haldi, at vit spældu ótrúliga væl tey bæði fyrstu settini, men so kiksaði tað onkursvegna í triðja setti. Kortini bleiv tað sum so mangan hjá okkum, tí tað vísir seg, at tá vit veruliga skulu levera, so gera vit tað eisini.

# Øgiliga góð kensla

Hilmar Jan Hansen

Ein av ungu spælarunum hjá ÍF er 21 ára gamli Uni Reinert Petersen, sum spælir libero. Hann var sera fegin, tá hann eftir seinnu finaluna í gjár stóð við øðrum av steypunum, ÍF fekk.

– Tað er ein øgiliga góð kensla at standa her við steypinum nú. Tað hevur nokk verið eitt sindur tungt at motiverað okkum, men tað er veldugt, at vit nú hava klárað tað. Vit orkaðu væl og hava kanska fleiri streingir at spæla uppá enn Mjølnir, segði hann.

Millum spælararnar hjá ÍF eru fleiri, ið mestsum mugu velja millum fótbólt og flogbólt, og Uni er ein teirra:

– Eg veit ikki, hvat eg skal siga til tað. Nú er tað jú soleiðis, at venjararnir eru beiggjar, so tað mugu teir finna útav, segði hann flennandi, áðrenn hann saman við hinum stillaði upp til eina glaða liðmynd av greipuvinnarunum úr Fugla-

# ÍF FANN




**MANSFLOGBÓLTUR** Leygardagin var talan um ein metlangan fimmsettara, men sunnudagin var lítil og eingin ivi, tí tá fann ÍF fram FM-formin, ið vísti seg at vera so mikið góður, at Mjølnir ikki fekk svarað aftur

Hilmar Jan Hansen

Hóast tað var dysturin í gjár, sum var løtan, tá ÍF vann og fekk gullið, verður tað óivað dysturin dagin fyri, ið verður standandi sum tann meira minniligi. Ikki minst, tí talan gjørdist um ein metlangan dyst, sum vardi í tveir tímar og 23 minuttir – í effektivari tíð, væl at merkja!

Tað var eisini dysturin, tá Mjølnir skuldi kent sína vitjunartíð. Serliga í fimta setti, tá ÍF var á veg til at vinna trygt og var á odda 14-10. Brádliga kom Mjølnir við og fór framum 15-14. Eins og ÍF bara hevði verið ein bólt frá at tikið settið og sigurin, var tað nú brádliga Mjølnir, ið »bara« skuldi vinna henda eina bóltin eyka og fara við øllum.

Men einki bar til hjá Mjølni, ið ikki megnaði at avgera, og tá tað so kiksaði fleiri ferðir, raknaði ÍF við aftur og fór avstað við tí heila við at vinna hetta fimta settið 20-18 og fyrra finaludystin 3-2. Ikki sørt, at hetta minti um steypafinaluna, har Mjølnir eisini var væl á veg í evstu løtu, men allíkavæl mátti finna seg í einari yvirháling.

Soleiðis endaði tað við, at ÍF eisini vann henda dystin á Mjølni, eins og ÍF hevur gjørt tað í allan vetur. Seinna finalan sunnudagin var áttandi dysturin millum liðini í vetur, og tá hann var av, talaðu hagtølini fyri seg, tí ÍF hevur vunnið teir allar!

## Oddaliðið var betri

ÍF hevur eisini verið oddalið í allan vetur, so at fuglfirðingar nú eisini struku avstað við meistaraheitinum, var fult í tráð við stigatalvuna, ið altso ikki leyg her. ÍF hevur verið best, og hóast Mjølnir spældi minst líka væl leygardagin, var eingin ivi í gjár, tá Mjølnir bara í løtum slapp at vera við.

Báðar dagarnar vísti tað seg, at hjá ÍF skal nokk so nógv ganga ígjøgnum Rúna Weihe, sum hesar dagarnar enn eina ferð fekk víst, at hann er suverent mest verdi spælarin í føroyskum flogbólti. Tað er veruliga at vóna, at hann fult út verður »fit for fight«, tá farast skal avstað til Oyggjaleikirnar á Isle of Wight í summar.